# Løgfrøðingur og búskaparfrøðingur til Kappingareftirlitið

Kappingarráðið

Vit bjóða tvey fjøltáttað og sjálvstøðugt størv við avbjóðandi uppgávum á einum arbeiðsplássi, sum er í menning.

Kappingareftirlitið søkir eftir tveimum fulltrúum til fyrisitingina av kappingarlógini, sum hevur til endamáls, við virknari kapping at fremja eina fulldygga samfelagsliga tilfeingisnýtslu til gagns fyri fyritøkur og brúkarar

Góðir møguleikar eru fyri persónligari og yrkisligari menning, bæði innan okkara egna virkisøki og í samstarvinum og samskiftinum við norðurlendskar og altjóða kappingarmyndugleikar.

Arbeiðið á stovninum skal vera á høgum fakligum støði, tí leggja vit dent á at bjóða starvsfólkum okkara viðkomandi og avbjóðandi útbúgving/eftirútbúgving.

Tú skalt starvast saman við dugnaligum starvsfelagum í einum óformligum starvsfólkaumhvørvi, og verður við til at loysa týðandi uppgávur, ið hava stóran týdning fyri vinnu og borgarar.

Vit kunnu hugsað okkum umsøkjarar við kandidatútbúgving innan løgfrøði og búskaparfrøði ella møguliga aðra samfelagsfrøðiliga útbúgving.

**Størvini**
Innihaldið í størvunum fevnir í høvuðsheitum um:
- at fyrireika mál til Kappingarráðið
- at standa fyri kanningum um kappingarviðurskifti
- at menna eftirlitsvirksemið
- at skriva frágreiðingar og vegleiðingar
- at orða reglugerðir og mannagongdir
- at menna fakligu førleikarnar á kappingarlógarøkinum

**Førleikar**
Vit vænta, at tú hevur:
- viðkomandi samfelagsvísindaliga útbúgving frá hægri lærustovni
- góð analýtisk evni
- royndir innan privata ella almenna fyrisiting (tó ikki nøkur treyt)

Umsøkjarar skulu vera førir fyri at arbeiða sjálvstøðugt, hava góð samstarvsevni og hegni at arbeiða undir trýsti.

**Setanartreytir**
Setanartreytir verða eftir galdandi sáttmála við BLF ella annað avvarðandi fakfelag. Setanin fevnir um Vinnumálaráðið og stovnar undir tí, umframt løgmansskrivstovuna og onnur aðalstýri.

Umsóknir, saman við prógvum og møguligum ummælum, skulu sendast til:

**Kappingareftirlitið**
**Skálatrøð 20**
**Postboks 73**
**FO-110 Tórshavn**

og vera stovninum í hendi í seinasta lagi tann 3. november 2008.

Nærri upplýsingar fáast frá Terja Sigurðsson, deildarleiðara, á tlf. 35 60 41 og t-post: terjes@kapping.fo ella Jógvani Thomsen, stjóra, á tlf. 35 60 21 og t-post: jt@kapping.fo. Heimasíða: www.kapping.fo

Kappingareftirlitið skal saman við Kappingarráðnum umsita løgtingslóg nr. 35 frá 3. mai 2007 um kapping. Kappingarráðið verður tilnevnt av landsstýrismanninum í Vinnumálum og Kappingereftirlitið er fyrisitingin hjá Kappingarráðnum. Fyrisitingarliga er Kappingarráðið skipað saman við, Post- & Fjarskiftiseftirlitinum og Tryggingareftirlitinum.

# Fíggjarfulltrúi

eilsumálaráðið



ıt

Sum fíggjarfulltrúi í Heilsumálaráðnum verða uppgávur tínar at ansa eftir, og hava umsjón við útreiðslunum til serviðgerð uttanlands, at ráðgeva stovnsleiðslum um fíggjarviðurskifti, umframt at vera við til at gera konsekvensútrokningar av lógum og øðrum fyriskipanum innan Heilsumálaráðið sum heild.

FØRLEIKAKRØV
Tú hevur útbúgving frá hægri lærustovni, so sum cand. polit., cand. oecon. ella cand. scient. pol., ella aðra viðkomandi útbúgving.

Starvsroyndir frá miðfyrisitingini ella aðrar fíggjarligar starvsroyndir er ein fyrimunur.

Harumframt væntа vit at tú hevur góðan kunnleika til teldur, umframt royndir, hug og evni at arbeiða við útrokningum og hagtølum. At tú hevur góð samstarvsevnir og evni at orða teg greitt í skrift og talu, og dugir at arbeiða sjálvstøðugt.

AVBJÓÐANDI STARV
Starvið sum fíggjarfulltrúi í Heilsumálaráðnum er áhugavert og mennandi við skiftandi og fjølbroyttum uppgávum. Starvið er sjálvstøðugt, og tú ført góðar møguleikar fyri skeiðum og framhaldandi førleikamenning.

Fyri framman eru nógvar avbjóðingar viðvíkjandi fíggjarstýringini í Heilsumálaráðnum. Talan er fyrst og fremst um, at ansa eftir útreiðslunum til serviðgerð uttanlands. Serviðgerð uttanlands eru tær útreiðslur, sum landið hevur í sambandi við at sjúklingar verða sendir av landinum til viðgerðar, í flestu førum niður til Danmarkar á Ríkissjúkrahúsið.

LØNAR- OG SETANARTREYTIR
Starvið verður sett sambært sáttmála ímillum Fíggjarmálaráðið og viðkomandi yrkisfelag. Viðmerkjast skal, at setanin fevnir um Heilsumálaráðið og stovnar undir tí, umframt Løgmansskrivstovuna og onnur aðalráð.

NÆRRI UPPLÝSING
Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Turid Arge, deildarstjóra, telefon 30 40 50 ella teldupost: ahr@ahr.fo.

UMSÓKN
Umsókn við avriti av prógvum o.ø. skal sendast til: Heilsumálaráðið, Eirargarður 2, FO-100 Tórshavn.

FREIST
Umsóknir skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi mánadagin 27. oktober 2008, kl. 12:00.

HEILSUMÁLARÁÐIÐ

Eirargarður 2 . FO-100 Tórshavn
Tel 30 40 50 . Faks 35 40 45
ahr@ahr.fo . www.ahr.fo

KREA